Hósdagur 11. oktober

SVF

18.30 Gloymdar leikur 9
18.40 Jumanji 25
19.10 Lundin fer á flog og kranin dryppar
20.00 Dagur og Vika við Grannum okkara
20.50 Horvin 3:8 - donsk dokumentarsending
21.20 Ally McBeal - am. røð
22.05 Roomservice - íbúðin verður broytt
22.30 Krimitímin: Dalziel og Pascoe - ensk krimirøð
23.20 Líðugt

Eurosport

07.30 Tennis
08.30 Xtreme Sports
09.30 Sailing
10.00 Sailing
10.30 Motorsports
11.00 Car Racing
11.30 Cycling
13.00 Cycling (Live)
16.00 Tennis (Live)
17.15 News
17.30 Tennis (Live)
20.30 Boxing
22.00 News
22.15 Football
23.15 Football
23.45 Football
00.15 News
00.30 Close

BBC Prime

0.05 TLZ: »American Visions – The Empire of Signs«
1.00 TLZ: »Century of Flight – Embracing the World«
2.00 TLZ: »The Sonnet«
2.30 TLZ: »Le Corbusier – Villa La Roch«
2.55 TLZ: »Short – Coming Home«
3.00 TLZ: »The British Family – Sources and Myths«
3.25 TLZ: »Computing and History«
3.30 TLZ: »A Formidable Foe«
4.00 TLZ: »Troubleshooter – The Old Cinderella Story«
4.40 TLZ: »Landmarks – Tudors and Stewarts – Henry VIII«
5.00 TLZ: »Japanese Language and People – Japan Tomorrow«
5.30 TLZ: »Teen English Zone«
6.00 Playdays: »The Poppy Stop«
6.20 The Really Wild Show
6.45 Kitchen Invaders
7.15 The Antiques Show
7.45 Real Rooms
8.15 Going for a Song
9.15 Zoo
9.45 Vets In Practice: »Vets Have Pets Too«
10.15 The Weakest Link
11.00 Doctor Who: »The Caves of Androzani«
11.30 Classic Eastenders
12.00 Eastenders
12.30 Hetty Wainthrop Investigates: »Safe As Houses«
13.20 Kitchen Invaders
13.50 Style Challenge: »Hair Colour«
14.20 Toucan Tecs: »Mad Ducks Olympics«
14.35 Playdays: »The Poppy Stop«
14.55 The Really Wild Show
15.20 Totp Eurochart
15.50 Great Antiques Hunt: »Sussex - Billingshurst«
16.20 Gardeners' World
16.50 Miss Marple: »A Murder is Announced«
17.45 The Weakest Link
18.30 Cardiac Arrest: »Suffer Little Children«
19.00 Eastenders
19.30 Heartburn Hotel
20.00 Aristocrats
21.00 Big Train
21.30 Seeking Pleasure: »Clubs«
22.30 Muscle
23.00 Out of Hours
23.45 A Little Later: »Us Soul Divas«

BBC World

0:00 BBC News
0:30 HARDtalk (r)
1:00 BBC News
1:30 Holiday (r)
2:00 BBC News
2:30 Reporters (r)
3:00 BBC News
3:30 Asia Today (r)
3:45 World Business Report (r)
4:00 BBC News
4:30 HARDtalk
5:00 BBC News
5:30 World Business Report
6:00 BBC News
6:30 World Business Report
7:00 BBC News
7:30 World Business Report
7:45 Sport Today
8:00 BBC News
8:30 Talking Movies (r)
9:00 BBC News
9:30 HARDtalk (r)
10:00 BBC News
10:30 Holiday (r)
11:00 BBC News
11:30 Europe Direct (r)
12:00 BBC News
12:30 HARDtalk (r)
13:00 BBC News
13:30 World Business Report
13:45 Sport Today
14:00 BBC News
14:30 Top Gear (r)
15:00 BBC News
15:30 Europe Direct (r)
16:00 BBC News
16:30 Asia Today
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Click Online
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Life
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

3

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:00 TV-shop
08:00 Panter-tanter(G)
08:25 Ricki Lake (G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Blossom(G)
12:20 Panter-tanter
12:50 Vild med dig
13:15 Pæn pige - sej sild
13:45 Baywatch Hawaii(G)
14:40 Blossom
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch Hawaii
16:35 Ricki Lake
17:30 Alle tiders barnepige
18:00 Felicity
19:00 Robinson - Talkshow
20:00 Brudens far
22:05 Tve-kampen(G)
23:05 Brian vs Tyson: Før braget i Parken
23:10 Vore værste år
23:40 Simpsons
00:10 Ricki Lake(G)
01:05 Drøm videre
01:40 Vore værste år (G)
02:10 Simpsons(G)
02:35 Sunset Beach
03:20 Godnat

ÚF

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur
Sørin Steinhólm á Toftum lesur
07.15 Barnaløtan
Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
07.30 Tíðindi
07.35 Morgunrásin
Hilmar Jan Hansen og Kári Olsen leggja til rættis
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin
09.00 Tíðindi
09.03 Sjónarringurin (e)
Árni Joensen leggur til rættis
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e)
Sørin Steinhólm á Toftum lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 1
10.10 Tit skriva, vit spæla
Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e)
Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e)
Helgi Jacobsen stílar fyri
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt
Tróndur Vatnhamar velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard
Rúni Jákupsson stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Í vingarðinum
Símun Jóannesarson Hansen leggur til rættis
18.00 Barnaløtan (e)
Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Skiftissiðir á lívsleiðini
Nýggj sendirøð, sum Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo
Kári Olsen stílar fyri
20.30 Stuttsøga
21.00 Tíðindi
21.10 Dagsetur
Øssur Egholm er vertur
22.00 Ljóðmúrurin
Bjarni Mohr leggur til rættis.
23.00 Tíðindi

Skiftissiðir á lívsleiðini

ÚF Hóskvøldið kl. 19.00

Fólk hava altíð og allastaðni á knøttinum havt ymsar skiftissiðir.
Øll gera burtur úr teimum stóru hendingunum í lívinum - føðingini, pubertetinum, hjúnarbandinum og deyðanum.
Hesaferð verður tosað við søgukvinnuna Elin Súsannu Jacobsen, sum sigur frá ymsum siðum í Føroyum og uttanlands. Tosað verður eisini um, hví tað er so umráðandi at geva teimum ymsu hendingum í lívinum gætur.

Jumanji 25

SVF Hóskvøldið kl. 18.40

Allan hevur fullkomiliga gloymt hvør hann er! Hann heldur seg vera Jumanji! Aftur fara Judith og Allan at royna at sannføra hann um, at hann er Allan.

Lundin fer á flog og kranin dryppar (e)

SVF Hóskvøldið kl. 19.05

Í einum húsum mitt í Havn ganga nøkur fólk og skera og skava, snara og pressa, smyrja og turka - nei, hetta eru ikki bilsmiðir, hóast handverkið minnir ikki sørt um bilsmið. Talan er um fýra listafólk og tey gera grafiskar myndir. Malan Johannesen vitjar Astri, Ogga, Aase og Jónu. Prátað verður um grafisku listina og um handverkið, og vit fáa eitt innlit í hvussu eitt listaverk verður skapað.
Lagt til rættis: Malan Johannesen. Fotografur: Bjarni Rubeksen. Klipt: Ragnar A. Jacobsen

Felicity (8)

- amerikonsk ungdómsrøð

3 Hóskvøldið kl. 18.00

Julie sigur Felicity, at Zack hevur neyðtikið hana. Felicity leitar sær hjálp hjá Noel, sum er tvungin til at melda Zack, um ikki Julie sjálv ger tað. Ben konfronterar Zack, eftir at hava hoyrt søguna frá Julie.

Brudens Far

- amerikanskur skemtifilmur frá 1991

3 Hóskvøldið kl. 20.00

Steve Martin spælir skógvaframleiðarin George Banks, sum fær eitt sindur av einum sjokki, tá hansara elskaða "lítla" dóttir, sum er 22 ár, kemur aftur úr Fraklandi og sigur teimum, at hon er vorðin trúlovað og skal giftast. Sama kvøld skal familjan hitta tann nýggja familjulimin, sum sjálvandi er ein sannur dreymur. Men George er ikki líka lættur at yvirtala...

Rás 2

09:45 Orðið
Bibliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Leysaløtan
Endursending frá í gjár
11:00 Tónleikur
12:00 Tíðindi og kunngerðir
12:15 Tónleikur
13:00 Ynskiløtan
Send heilsur via (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi og kunngerðir
15:10 Leysaløtan
16:00 Tónleikur
17:00 Norðlýsið
Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík
John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18:00 Tíðindi og kunngerðir
18:10 Tónleikur
19:00 Orð á leiðini (EvR)
Andaligur búnaðskapur: "Hvussu lesi eg Bibliuna?" (1. partur av 2)
Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og kunngerðir
21:15 Orðið
Endursending frá í morgun
Bibliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Tónleikur
22:00 Girlzone
Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri.
Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Líðugt

Lindin

13.00 Byrjan – Dagsskráin verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Lýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum.
20.55 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti (e)
21.00 Bønarlinjan við gesti, vertur er Jenis av Rana
Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379
Vit gevast uml. middnátt

ítróttur

Nr. 192 • fríggjadagur • 5. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Við fyri fyrstu ferð

Klæminst Matras úr B36, sum fyri fyrstu ferð er á landsliðnum, hevur í øllum førum vónir um at sleppa á vøllin leygardagin

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk/ Álvur Haraldsen – Bled, Slovenia

Tað er ikki sørt, at árið, 2001, hevur verið minniríkt hjá Klæminti Matras. Hann hevur í ár veruliga fingið sítt gjøgnumbrot í føroyskum 1. deildarfótbólti, hevur vunnið bæði lands- og steypakapping, og nú er hann so fyri fyrstu ferð sloppin við á føroyska A-landsliðnum.

Hóast hetta kanska tykist dekan ov nógv at taka í einum, so sigur Klæmint tó, at hann á ein hátt hevði roknað við hesum.

- Sjálvandi kann eg ikki siga, at eg roknaði við at verða úttikin, men eg havi alla tíðina havt vónina. Tað er eitt sindur ringt at siga, men tú kanst skriva, at eg hevði eina góða kenslu, áðrenn liðið varð úttikið. Alt hevur jú gingið so væl, so hví ikki.

Vónar at sleppa inn

Spurdur, um Allan Simonsen ella Jógvan Martin Olsen kanska høvdu givið til kennar, at miðvallarin fór at verða úttikin hesa ferð, sigur Klæmint, at tað høvdu teir ikki, og tí var hann kortini eitt sindur bilsin, tá boðini so komu.

- Jú, sjálvandi var eg bilsin. Sum eg sigi, so hevði eg vónað at komið við, men roknað við tí hevði eg ikki veruliga.

Og hóast hetta er fyrsta ferðin, so tykist Klæmint ikki vera somikið smæðin, at hann ikki hevur vónir um at sleppa á vøllin leygardagin.

- Tað vóni eg sjálvandi. Tað er jú tí, at eg eri komin niður. Hinvegin er tað ikki tann stóra katastrofan, um eg ikki sleppi við. Hetta er fyrsta ferðin hjá mær, og so má eg bara royna at sannføra venjaran um, at eg eisini eigi eitt pláss í hópinum í framtíðini, sigur Klæmint Matras at enda.

- Sjálvandi kann eg ikki siga, at eg roknaði við at verða úttikin, men eg havi alla tíðina havt vónina, sigur Klæmint um landsliðsúttøkuna

Óttafullir slovenar

Hóast mótstøðumenn okkara leygardagin hava møguleika at koma eitt stórt fet nærri HM, so tykjast miðlarnir í landinum ikki at vera fullvísir í sigrinum

LANDSDYSTUR
Álvur Haraldsen/ Jákup Mørk – Bled, Slovenia

Hóast slovenar mugu metast sum greiðir favorittar, tá teir leygardagin fara á vøllin móti Føroyum, so er tað ikki sørt at lokalu fjølmiðlarnir stúra fyri týdningarmikla dystinum, sum kann tryggja slovenum ein eyka møguleika at koma til HM-endaspælið.

Orsøkin er tann, at tað longu nú er greitt, at slovenski uppstillingin, Katanec, noyðist at verða fleiri av stuðulsleikarum sínum fyri uttan til dystin móti Føroyum. Einum liði, sum Slovenia longu hevur mist stig ímóti einaferð.

Nógv avboð

Fyrst og fremst eru tað leikbann, sum gera um seg. Acimovic, Pavlin og Ceh hava allir fingið ov nógv gul kort á kontina, og kunnu tí ikki vera við ímóti Føroyum. Harafturat er tað ivaleyst eisini ein dyggur smeitur, at miðvallarstræturin hjá liðnum, Malin Oosterc, tykist vera so mikið illa skaddur, at hann neyvan verður tøkur til dystin.

Hetta merkir so, at Katanec skal seta eitt at kalla nýtt lið saman, og støðan verður ikki lættari av, at venjarin enn ikki er greiður um, hvørjir leikarar verða førir fyri at spæla, og hvørjir mugu geva avboð.

Arbeitt verður við fullari ferð í slovensku heilsusektorinum, og ikki minst er tað stóra hetan hjá landinum, Zlatko Zahovic, sum prátið og skrivingin snúgva seg um. Hann hevur havt ein heldur argandi skaða í nakrar vikur, men tá vit frættu seinast, so vóru vónirnar kortini góðar fyri, at absolutta stjørnan á liðnum fór at gerast klárur.

Harafturat hava Rudonja og málverjin, Simeunovic verið eitt sindur ivasamir, men tað røkist nú fyri, at hesir eisini verða tøkir.

Stórur áhugi

Annars tykjast øll á einum máli um, at dysturin móti føroyingum hevur stóran áhuga millum fólkið. Leikvøllurin, Pod Bezigradom, hevur rúm fyri einum 10.000 áskoðarum, og miðlarnir tykjast ivaleyst í, at fullsett verður.

Einasti vansin, sum tíðindamenninir siga um vøllin, er, at orsakað av nógva regninum í Ljubljana, verður hesin helst nakað tungur at spæla á.

Fyri okkara menn er tó ikki víst, at hetta fer at verða nakar vansi. Fyrst og fremst tí hetta ivaleyst fer at viðvirka til, at slovenar helst fáa ilt við at fáa ferð á spælið, men við minninum um ein regnvátan dyst á Svangaskarði herfyri, gerast føroysku vónirnar um eitt gott úrslit neyvan minni.